# Seismisku kanningarnar umborð á Thetis órógvaðar av veðrinum

Sjóverjuskipið Thetis skjýtur í løtuni seismikk undir Føroyum. Tá vit um middagsleitið í gjár tosaðu við skiparan Herluf Rasmussen, var Thetis í gongd við at skjóta seismikk á næstsíðstu linjuni vestanfyri Føroyar. Einans 400 av 2000 kilometrum eru komnir í telduna, tí keðiliga veðrið seinkar arbeiðnum.




Sjóverjuskipið Thetis skjýtur í løtuni seismikk fyri Western undir Føroyum



Herluf Rasmussen, skipari á Thetis: – Stóru aldurnar órógva arbeiðið, so vit av og á eru noyddir at gevast og bíða eftir betri líkindum

DIA MIDJORD

Stutt eftir middag í gjár høvdu vit samband við sjóverjuskipið Thetis, sum var vestan fyri Suðuroynna ávegis móti Mykinesi. Thetis er í holt við at skjóta seismikk fyri Western. Tilsamans 2000 kilometrar skulu skjótast, men einans 400 kilometrar eru komnir í telduna.

– Tað ber ikki til at siga, hvussu leingi hetta arbeiðið tekur. Eg kann bert siga, at vit eru liðnir um 2000 kilometrar, sigur Herluf Rasmussen, skipari á Thetis.

Sjóverjuskipið hevur verið í gongd einar 14 dagar og um 400 kilometrar av seismikki eru skotnir. Skipið sleipar ein 5 kilometra langan kápil aftan á sær, ið liggur 8 metrar undir vatnskorpuni.

– Vit hava náttúruna at dragast við og tað er ikki so lætt, tá vit skulu gera slíkar neyvar mátingar. Stóru aldurnar órógva so mikið nógv, at kápilin viðhvørt byrjar at boyggja seg og hetta gevur so aftur ov nógvan larm undir mátingunum, at tær gerast óneyvar.

– Vit eru so noyddir at gevast og byrja so aftur, tá veðrið er vorðið fræðgari, sigur Herluf Rasmussen, skipari á Thetis.

Manningin á Thetis telir 74. Av teimum eru 14 mans, teknikarar og aðrir, ið eru serfrøðingar innan seismikk. 8 av serfrøðingunum hoyra til Western-felagsskapin.

Í gjáramorgunin var ætlanin, at tyrlan hjá sjóverjuni skuldi flyta føroyskar journalistar og innboðin út á Thetis, so til bar at fylgja við seismisku kanningunum, síggja skipið og alla útgerðina. Men veðrið loyvdi ikki hesum, tí sýnið bleiv so vánaligt.

Herluf Rasmussen sigur við Dimmalætting, at teir í komandi viku ætla at royna einaferð enn, so jornalistar og innboðin kunnu sleppa út á Thetis.

# Fólkið farið á uppboðssøluni

Av teimum fimm fólkunum, sum arbeiða á uppboðssøluni í Klaksvík, hava fýra sagt seg úr starvi.

LEIF LÁADAL

Fiskamarknaður Føroya kunngjørdi í lýsing í gjár, at fólkið á uppboðssøluni í Klaksvík, sum var á starvsfólkafundi leygardagin, skuldi møta til arbeiðis sum vanligt.

Fólkið møtti, men bert fyri at siga stjóranum Ditleif Eldevig, at tey søgdu seg úr starvi. Eitt av teimum fimm starvsfólkunum heldur tó fram.

## Uppsagnarfreist

Í gjár var lítið og einki arbeiði gjørt á uppboðssøluni í Klaksvík, men stjórin tingaðist við tey starvsfólk, sum hava sagt seg úr starvi, um tey ætla sær at arbeiða í uppsagnartíðini.

Hvussu long uppsagnartíðin er, fekst ikki at vita í gjár, men um tey starvsfólk, sum hava sagt upp, velja at fara til hús nú, er talan um sáttmálabrot, og so kann reisast endurgjaldskrav.

## Nýggjur leiðari settur

Mikudagin varð nýggjur leiðari settur á uppboðssøluni í Klaksvík. Jákup Marner Klein hevur átikið sær at fáa gongd á aftur keyp og sølu av fiski.

Jákup Marner Klein er 40 ára gamal og úr Klaksvík. Hann hevur siglt við danska handilsflotanum, men er júst nú við Grælingi. Tá hesin túrur er av sunnudagin ella mánadagin, tekur Jákup Marner Klein við sínum nýggja starvi.

Stjórin á Fiskimarknaði Føroya Ditleif Eldevig sigur seg vera væl nøgdan við, at nýggjur leiðari so skjótt var funnin, og hann hevur prátað við Jákup Marner Klein, sum sigur seg ganga 100 prosent inn fyri sínum nýggja starvi.

Fyrsta uppgávan hjá nýggja leiðarinum er at seta nýggj fólk. Leiðarin er frítt stillaður viðvíkjandi vali av arbeiðsfólki. Hann avger eisini sjálvur, hvussu nógv fólk hann setur í starv.



Hósmorgunin fekk stjórin á Fiskimarknaði Føroya, Ditleif Eldevig, boð um, at fýra av teimum fimm starvsfólkunum á uppboðssøluni í Klaksvík siga seg úr starvi

# Tosar um kynsligan ágang móti børnum

Vóru børn fyri kynsligum ágangi fyrr í tíðini og hendir hetta eisini í øðrum mentanum enn okkara egnu? Millum annað hesar spurningar fer barnasálarfrøðingurin, Ingrid Leth, at viðgera í almennum fyrilestri í Norðurlandahúsinum komandi hóskvøld.

ÓLUVA ZACHARIASEN

Komandi hóskvøld fer danski barnasálarfrøðingurin, Ingrid Leth, at halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum. Evnið er »Seksuelle overgreb mod børn i et tværkulturelt perspektiv«. Fyrilesturin, sum er almennur, byrjar kl. 19.30 og er tað Kvinnuhúsið, sum skipar fyri.

Í fyrilestrinum fer Ingrid Leth m.a. at viðgera spurningin, um kynsligur ágangur móti børnum eisini var eitt kent fyribrigdi fyrr í tíðini og um hetta eisini kemur fyri í øðrum mentanum/samfeløgum. Eisini fer hon at skilja ímillum tann kynsliga ágang, ið gongur fyri seg í familjuni sjálvari og so tann, sum ikki verður framdur av familju.

Harumframt fer Ingrid Leth at tosa um tær nýggjastu kanningar, sum gjørdar eru viðvíkjandi kynsligum ágangi móti børnum og haraftrat er eisini ætlanin at koma inn á, hvussu kynsligur ágangur í barnalívinum kann ávirka seinni og um tað yvirhøvur er gjørligt nakrantíð at gloyma tílíkan ágang.

Ingrid Leth starvast sum leiðari á sálarfrøðiligu megindeildini við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

# Sjálvhjálparbólkur fyri incestoffur

Kvinnuhúsið fer í heyst at skipa fyri sjálvhjálparbólki fyri kvinnur, ið sum smágentur ella hálvvaksnar hava verið fyri kynsligum ágangi.

ÓLUVA ZACHARIASEN

Eins og undanfarin ár ætlar Kvinnuhúsið aftur í heyst at skipa fyri sjálvhjálparbólkum, har kvinnur við ávísum trupulleikum fáa høvi at tosa við aðrar kvinnur við somu trupulleikum sum tær sjálvar.

Eyðvør Olsen sigur vegna Kvinnuhúsið, at í heyst er ætlanin at hava ein bólk við kvinnum, ið antin sum smágentur ella hálvvaksnar hava verið fyri kynsligum ágangi ella incest. Júst hetta evnið hevur verið rættiliga nógv frammi í seinastuni og fólk, ið dagliga arbeiða við sosialum trupulleikum siga, at hetta er nakað, ið ofta kemur fyri í Føroyum eisini.

Kvinnuhúsið roynir at savna kvinnur við eintáttaðum trupulleikum, so tær kunnu hjálpa hvørjari aðrari. Kvinnuhúsið skipar fyri sjálvhjálparbólkum hvørt heyst og hvørt vár og vanliga eru tveir bólkar hvørja ferð. Nógvir ymiskir bólkar hava verið, til dømis hevur ein verið við avvarðandi hjá alkoholikarum. Ein annar bólkur var um anorexia og uppaftur onkur annar um sorg. Eisini hevur Kvinnuhúsið áður havt ein sjálvhjálparbólk við kvinnum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi í uppvøkstrinum. Vanliga er eisini ein sálarfrøðingur ella onkur annar kønur á teimum ymsu økjunum við í sjálvhjálparbólkunum.

Væntandi byrja bólkarnir einaferð í september, men Eyðvør Olsen sigur, at Kvinnuhúsið seinni fer at lýsa við tiltakinum, so kvinnurnar kunnu melda seg til. Hvør bólkur virkar í uml. 10 vikur.




Aftur í heyst skipar Kvinnuhúsið fyri sjálvhjálparbólkum og ætlanin er at hava ein bólk við incestoffrum.

## *Kvindernes fred*

***(SvF 13-8-96: Burma – óttafulla landið)***

*Der var en fejl i mine sidste vers,*
*men sådan kan uheldet falde –*
*det kommer mig en smule på tværs,*
*at jeg glemte den værste af alle!*

*Burma er lidelsens smertepunkt*
*med en sindssyg galning ved roret.*
*Her dræbes både gammelt og ungt*
*i et vanvittigt folkemordet.*

*Hvad Østens folkemasser har lidt,*
*lader sig ikke beskrive.*
*Og døden var ofte og tit*
*bedre end at være i live.*

*En spinkel, værgeløs kvinde står frem*
*og taler mod magten og blodet.*
*Hun vækker et håb i millioner hjem –*
*og man må beundre modet!*

*Hvor kvinder må trælle for slaveløn,*
*har Asien dog fået at mærke,*
*at det såkaldte svage køn*
*også kan være det stærke!*

*Vi må håbe, kvinder kan skaffe fred*
*og menneskeværdige skikke –*
*for mændenes vanskabte krigeriskhed*
*klarer det afgjort ikke!*

***Aage H***